FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 27. februar 2024
J. nr.: 24/03854
Viðgjørt: ASL

Svar til §52a fyrispurning nr. 52-090/2023 frá Beini Johannesn, løgtingsmanni, settur landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum, Ruth Vang, um manglandi útboð av vørum og tænastum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvat ætlar landsstýriskvinnan gera við, at reglurnar um útboð ikki verða fylgdar?

Svar:

Landsstýriskvinnan er samd við spyrjaran um, at reglurnar ikki altíð verða fylgdar og at stovnar landsins harvið hava ov fá útboð á Keypsportalinum og ikki altíð hava umbiðið loyvi til undantak fyri útbjóðing.

Høvuðsendamálið við keypsrundskrivinum er:

1. at fáa mest møguligt burtur úr skattgjaldarans peningi
2. at stimbra kappingina og javnseta veitarar
3. at skapa gjøgnumskygni og harvið álit á fyrisitingina

Ein fullkomin støða hevði verið, at øll størri keyp av vørum og tænastum verða bjóðað alment út á Keypsportalinum. Øll miðalstór keyp verða avgreidd við tilboðsfyrispurningi til 2-3 veitarar. Fá, men neyðug undantøk, høvdu verið latin. Smærri keyp vóru avgreidd sambært rammusáttmálum galdandi á ymsu økjunum.

Tað er ikki núverandi støða. Tað er hinvegin neyðugt at alsamt royna at nærkast fullkomnu støðuni. Tað skal tó nevnast, at tað finnast skuggatøl, tí í verandi støðu verða tilboðsfyrispurningar ikki skrásettir nakrastaðni. Tað eru nógv keyp, sum verða avgreidd við tilboðsfyrispurningi.

Í ársfrágreiðingini hjá Keypi Landsins fyri 2022 verður víst á fleiri viðurskifti fyri at koma longri fram á leið. Høvuðsniðurstøðan er, at royndirnar hava víst, at landið hevur havt góð úrslit av at bjóða út alment. Royndirnar hava hinvegin eisini víst, at landið hevði havt størri sparingar, um landsins stovnar bjóðaðu út í felag og vóru meira bundnir av rammusáttmálunum.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Gjaldstovan heldur, at landsins stovnar skulu bjóða út í felag og harvið binda seg til rammusáttmálar fyri at fáa meira fyri pening skattgjaldarans. Tað, at nakrir stovnar sleppa undan ásetingunum í rundskrivinum, máar støðið undan keypsrundskrivinum.

Skal rundskrivið fáa ætlaða virknaðin mugu aðalráðini vísa ábyrgd, tá ið stovnar ikki bjóða út ella ikki fylgja rammusáttmálunum.

Gjaldstovan heldur eisini at upphæddsmørkini fyri nær bjóðast skal út verða lækkað, og at krøv verða sett stovnum um at lata Keypi Landsins upplýsingar at nýta til hagtøl.

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum ætlar at mæla landsstýrinum til at fylgja tilmælunum og fer í næstum at biðja um undirtøku frá landsstýrinum at dagføra rundskrivið

Landsstýriskvinnan fer eisini saman við Keypi Landsins at gera meting av, um stovnar landsins fara ov lætt um ásetingarnar í Rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum.

Um stovnur verður funnin at fara heldur lætt um ásetingarnar eigur játtanin at verða skorin samsvarandi.

Harumframt er neyðugt saman við aðalráðunum at endurskoða Keyp Landsins og hvussu Keyp Landsins verður fíggjað, skipað og mannað framyvir.

Tinganes, 27. februar 2024

Ruth Vang
landsstýriskvinna í fíggjarmálum